# Politisk og fíggjarlig loysing frá Danmark! Men hvør sleppur við?

EYÐUN MOHR VIDERØ



Løgnar viðmerkingar um ynski frá Sandoynni um at fáa ein undirsjóartunnil millum Sandoy og Streymoy.

Skilji væl, at onnur uttan fyri hetta økið seta spurning um kostnaðin av hesi ætlan, men eg sakni teirra støðu til týdningin av hesi íløgu. Og serliga frá tjóðveldisfólki, ið seta álít sítt á einar "frælsar Føroyar", men bert fyri summi!

Samgongar hevur sum stavnhald at lækka fíggjarliga stuðulin úr Danmark við góðum 100 mió kr. um árið. Havi verið samdur um, at innsprænging av fremmandum kapitali í búskapin, uttan tilsvarandi framleiðslu í samfelagnum, at hetta ørkymlar okkara búskap.

Nú skulu vit nýta kapital, eins og altíð. Men tá talan er um at nýta týðandi upphæddir til tunnil til Sandoynna fyri at gera hesa til ein ein part av Føroyum, nú verða øll segl reist ímóti, tí vit mugu gera íløgu í okkara sjúkrahúsverk v.m. sum hevur verið undirmett í øllum gulltíðunum, meðan tá ikki var talan um nakran tunnil!

Stríðið ferðast í samgonguni, tí Gerhard ikki hevur álit á "fundarrøðini" hjá samgonguni um ætlanina innanhýsis, meðan Páll væntar eitt gott úrslit fyri Sandoynna!

Fyri mær tykist endamálið greitt hjá Bjørt v.m., at neyðugt er at yvirliva hetta samgonguskeiðið, uttan at gera hesa íløgu, og tí skulu neyðloysnir og útsetingar avtalast, so leingi hetta gerst neyðugt!

Fyri okkum í Sandoynni og fyri okkara eftirkomarar er bert eitt at gera fyri at yvirliva her: Okkara tingmenn eiga ikki at góðtaka nakra politiska avtalu um sandoyartunnilin, uttan henda skal fremjast í hesum valskeiði við eini bindandi avtalu!

Her stendur Gerhard fastur, men eg ivist í støðuni hjá tjóðveldismanninum!

Hví so ikki sleppa ætlanini um lækking av stuðlinum úr Danmark og koyra pengarenar í tunnilsgrunnin?

Eg havi orsøk til at vænta mær nakað av Tjóðveldisflokkinum, tá tað snýr seg um einar sjálvstýrandi Føroyar, men við núverandi støðu, so "svækkes min tro"!

# Gamalt manskór við nýggjum sangum

**Tey, ið dáma væl at lurta eftir manskórum, fáa ein gyltan møguleika til hetta, tá danska manskórið við tí beinrakna navninum "Mandskoret Sønderborg" kemur á vitjan í næsta mánaði. Miðalaldurin á kórinum er 60 ár**

KÓRSANGUR
*Snorri Brend*



*Kórið hevur høgan miðalaldur, men sanggleðini og samanhaldinum hjá Mandskoret Sønderborg bilar einki*

Vitjanin hjá manskórinum verður í døgunum 20. til 24. august, og fer kórið at hava tvær konsertir - eina í Havn og eina í Gøtu.

Fyrra konsertin verður hóskvøldið 21. august í Norðurlandahúsinum. Við hesa konsertina fer Mandskoret Sønderborg at syngja sjálvir, men eisini saman við Tórshavnar Manskóri.

Seinna konsertin verður leygardagin í Gøtu, har kórið skal luttaka við eina kirkjukonsert saman við kórinum Eystanljóð.

Tað sum ger hesa vitjanina so forkunnuga er fyrst og fremst tað, at talan er um eitt manskór.

Í øðrum lagi er vert at nevna, at millum sangararnar er havnarmaðurin og yvirlæknin, Óli Jacobsen og sum kemur frá sangglaðari familju. Nú hann er á heimavølli fer hann uttan iva at gera sítt til, at ferðalagið úr Danmark fær eina so áhugaverda vitjan sum gjørligt.

Hóast talan er um eitt manskór, so er tað ein kvinna sum stendur á odda fyri hesum 45 monnunum. Talan er um Helle Damkjær, ið er 15. kórleiðarin í Mandskoret sum varð stovnað so langt afturi sum í 1921.

### Konsertir og ferðir

Sangúrvalið hjá Mandskoret Sønderborg er rættiliga fjølbroytt. Tað spennir frá fosturlandssangum til meiri lættari sangir - og sum teir siga: Nýggir sangir koma alla tíðina á sangskránna.

Kórið hevur sungið rættiliga nógv hesi árini, ið tað hevur verið virkið, bæði heima og úti. Heima hava teir m.a. verið fastir gestir á skránni til jólaveitsluna hjá pensjónistunum, og við várkonsertina í Musikhuset, har øll kórini úr økinum framføra nakað av tí, tey hava lært og sungið um veturin.

Kórið hevur haraftrat bæði vitjað í Svøríki, Onglandi, Wales og í Letlandi, og var á sumri 2006 við til Sønderborg Sammer Revy, har teir sungu við í endalagnum íalt 40 ferðir.

Nú liggur so leiðin hjá Mandskoret til Føroyar. Ein av næstu stóru uppgávunum teirra verður í 2010, tá kórið skal fyriskipa Dansk Sanger Forbunds landsstævne í Sønderborg.

Fram um alt leggur kórið kortini dent á tann sosiala felagsskapin millum sangarar og hjúnafelagar teirra.

# Áhugi fyri oljuleiting hóast turrar brunnar

3. ÚTBJÓÐING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Næstseinasta fríggjadag lat 3. útbjóðing til oljuleiting á føroyska landgrunninum upp fyri oljufeløgunum. Í hesum døgum verður útbjóðingartilfar sent út til áhugað feløg, her m.a. faldari við loyvisøkjunum á. Feløg skulu so søkja innan 3. november og verða loyvini latin innan árslok. Hetta upplýsir Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi.

Hann sigur, at enn er stutt fráliðið, men fleiri feløg hava longu vent sær til Jarðfeingi við fyrispurningum. Her er bæði talan um gomul feløg, tvs. feløg, sum hava verið við í leitingini higartil og nýggj feløg, sum ikki hava verið við í hvørki 1. alla 2. útbjóðing. Men eitt eru fyrispurningar, annað er veruligur áhugi. Tað vil tíðin so vísa.

Petur Joensen sigur, at tað verður eisini spennandi at síggja, hvørji øki verða latin til leiting í seinastu bretsku útbjóðingini, sum lat aftur herfyri. Her hugsar hann serstakliga um øki framvið føroyska markinum. Gongdin í bretskum øki, har tvey stór oljufund, Cambo og Rosebank møguliga verða útbygd til framleiðslu, kann eisini hava positiva ávirkan á 3. útbjóðingina á føroyska landgrunninum. – Trúgva feløgini uppá økini bretsku megin markið, so kann tað eisini fáa feløg at vísa okkara útbjóðing ans, tí at kunna vera við báðumegin markið kann vera skilagott fyri oljufeløg, sum veruliga síggja eina framtíð á Atlantsmótinum sigur Petur Joensen á Jarðfeingi. Dømi eru longu um, at fleiri oljufeløg, sum hava loyvi í bretskum øki, eisini hava fingið tillutað øki okkaramegin markið.

Sum Portalurin skilur eru tað m.a. oljufeløg úr fjareysturi, sum vísa føroyska landgrunninum ans umframt stór oljufeløg, sum eru virkin vestan fyri Hetland.



*Petur Joensen,*
*stjóri í Jarðfeingi*